# Á NETINUM



## Øll googla - arbeiðsgevarar googla eisini

*Tað er neyvan nøkur loyna at arbeiðsgevarar googla starvsfólk, sum teir umhugsa at seta í starv og hetta er eisini galdandi í Føroyum. Dømir eru um at fólk ikki hava fingið størv, tí arbeiðsgevarar hava funnið ymiskar upplýsingar á netinum um viðkomandi.*

*Ein privatur arbeiðsgevari, sum vendi sær til Dátueftirlitið herfyri segði, at hann kundi ikki funnið uppá at sett fólk í starv, áðrenn hann hevði googlað viðkomandi. Hann hugdi m.a. eftir hvørjar vinir viðkomandi hevði, tí hetta metti hann segði nógv um, hvørji fólk eru.*

## Googla teg

**Vegleiðing:**

*Roynið og googlið tykkum sjálvi ella setið tykkum saman – foreldur og børn – og googlið hvønn annan. Tað ber eisini til at fáa myndir av tykkum sjálvum fram við at trýsta á "myndir" ovast í vinstra horni. Samsvarar netsamleikin og veruligi samleikin? Hví/hví ikki?*

*Gerið tykkara egnu reglur fyri tað, tit leggja á netið.*

## Góð ráð til foreldur

- Sum foreldur er tað ofta trupult at vita, hvussu vit skulu bera okkum at viðvíkjandi spurninginum um børn á internetinum, og tí verða her nøkur góða ráð til foreldur endurgivin:
- Góðtak at elektroniskir samskiftismiðlar eru vorðnir ein partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum. Fartelefonin og internetið eru komin fyri at vera, og tú kanst eins væl taka í hondina á barninum og leiða tað gjøgnum vandarnar á netinum. Vís vegin – eins og í ferðsluni.
- Tosa við tey. Sum foreldur hevur tað týdning at hava áhuga fyri, hvat børnini gera, tá tey eru á netinum og at tosa við tey um tað fyri á henda hátt betur at skilja, hvat tey fáast við á netinum, og hvussu tey nýta fartelefonina.
- Kunna teg og fylg við. Vitja tær síður, sum tey ungu vitja. Kjatta, send eitt sms, spæl við – royn sjálv. Vís áhuga í staðin fyri ótta, sum ofta kemur av vantandi kunnleika til hesar nýggju samskiftismøguleikar.
- Lat vera við at seta forboð – men set ístaðin realistisk mørk. Ger t.d ein politikk fyri nýtslu av interneti, fartelefon, myndatólinum í telduni, spølum v.m saman við børnunum.
- Minst til at forvitni og at royna, hvussu langt tú kanst fara, eru náturlig, og at tín ábyrgd ikki bara er at siga nei, men at vera tann vaksni, ábyrgdarfulli sparringspartnarin, tá mørk skulu roynast.
- Lurta eftir børnunum, tá tey royna at taka teg við. Lurta eisini eftir tí, sum ikki verður sagt. Legg merki til broytingar í teirra atburði. Eru tey kedd ella stúrin?

Ella sagt við øðrum orðum:

- Tosa saman. Besta keldan til kunnleika um, hvat títt barn ger á netinum, er barnið sjálvt.
- Tosa og lurta. Hvørjar síður vitja tey? Hvønn eru tey vinir við? Hvønn eru tey ikki vinir við? Hvat gera tey, um tey koma út fyri onkrum keðiligum ella ótespiligum á netinum, hvønn tosa tey tá við? Á hendan hátt fært tú ein betur kunnleika til on-line lívið, tey liva, og kanst betur hjálpa og stuðla teimum.